# Landstýrið lumpaði Løgtingið

**Poul Michelsen løgtingsmaður Fólkaflokksins í Suðurstreymoy leggur Landstýrið undir at hava lumpað Løgtingi undir viðgerðini av Fíggjarlógini fyri 2007.**



POLITIKKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í lesarabrævi í dag skrivar Poul Michelsen, at tað var eitt mistak, tá hann atkvøddi fyri fíggjarlógini 2007, men:

“Eg vil tó ikki taka størri ábyrgd av mistakinum, enn eg veruliga havi. Eg havi verið í iva, um landsstýrið veruliga lumpaði orðingina um sendistovuna inn í viðmerkingarnar til fíggjarlógina, men eftir at hava lisið Bjarna Djurholm, eri eg sannførdur um, at hetta veruliga var so.”

Hann vísir á, at viðmerkingarnar um sendistovuna ikki vóru í viðmerkingunum til fíggjarlógina, við 1. viðgerð í oktober, og at tá fíggjarnevndin legði fíggjarlógaruppskotið fyri tinginum 19. desember, høvdu hvørki fíggjarnevndarlimir ella tinglimir stundir at lesa allan tekst, og tí varð bert tal-tilfarið gjøgnumgingið.

Poul Michelsen staðfestur:

“Fíggjarlógin fyri 2007 varð samtykt í einum ruðuleika av rossahandlum, og tá uppskotið, seint á kvøldi tann 21. december, bleiv samtykt, vóru tað bert fáir, sum vistu av láturligu sendistovutekstin. Løgmaður og Djurholm vóru so tveir av hesum.

Tað er tí ov bíligt av teimum at goyma seg aftan fyri tær 32 atkvøðurnar í tinginum, sum bert hava samtykt taltilfarið. Her er ikki farið rætt fram.”

Poul Michelsen sigur seg ikki vilja hava ábyrgd av skommini, og at hann fyri at rætta mistakið hevur lagt uppskotið fram um, at vit í Íslandi bert skulu flagga við føroyskum flaggi.

Hann sigur somuleiðis, at fyri hann er púra greitt, at sendistovuætlanin hjá løgmanni beinleiðis skaðar samvinnuna landanna millum.


# Starv sum lønarumsitari

sansir.fo

**Av tí at okkara dugnaligi lønarumsitari hevur sagt upp og fer í annað starv, verður hervið søkt eftir lønarumsitara/skrivstovufólki til Fíggjardeildina á Strandfaraskipum Landsins.**

**Starvið**
Tann, sum settur verður, skal tryggja eina effektiva umsiting av lønarútreiðslunum og skrásetingum á Strandfaraskipum Landsins.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- Skráseting og avstemman av tímaseðlum o.l.
- Viðlíkahald av starvsfólkadátabasu
- Umsiting av sáttmálum við fakfeløg
- Samstarv og samskifti við: Starvsfólk og deildarleiðarar á fyritøkuni Fakfeløgini Fíggjarmálaráðið/Lønardeildina
- Útgjalding av lønum o.ø.
- Tryggja at lønarútreiðslurnar verða skrásettar á rætt endamál og stað
- Uppseting av lønarhagtølum
- Inntøpping og bóking av bókhaldsskjølum
- Avstemming av bankakonti
- Avgreiða fyrispurningar frá kundum

Annar týðandi partur av starvinum er at samstarva við Starvsfólkadeildina um at loysa felags uppgávur.

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki og royndir í Navision fíggjarstýringsskipanini og Løtt Løn
- Kunnleiki og royndir í Microsoft Office forritunum
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og verður lønt í lønarflokki 4.

Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Uppgávurnar hjá Fíggjardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni í fyritøkuni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina hjá fyritøkuni.

**Aðrar høvuðsuppgávur eru:**
- Fyriskiping av roknskaparverkinum
- Uppseting av fíggjarætlanunum
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Játtanareftirlit
- Lønarfyrisiting

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum og møguligum viðmælum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. mars 2007 kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksen, fíggjarleiðara, á tlf. 343021 ella t-post: jor@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Strandferðslan umsitur 29 farleiðir (7 Oyggjaleiðir og 22 Bygdaleiðir). Talið á flutningsførum er 8 ferjur og 40 bussar. Samlaða talið av starvsfólkum svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Starv sum skipsinspektør

sansir.fo

**Av tí at okkara dugnaligi skipsinspektørur hevur valt at fara í annað starv, verður hervið søkt eftur nýggjum skipsinspektøri at byrja sum skjótast.**

Ert tú neyvur og álítandi? Hevur tú fokus á útreiðslur, trygd og umhvørvi? Trívist tú við at hava nógv at gera?

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum skipsinspektøri at byrja sum skjótast.
Tú kemur at arbeiða á rakstrardeildini, ið hevur ábyrgdina av rakstrinum av øllum skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

**Starvið**
Skipsinspektørurin stendur fyri umsjónini og eftirlitinum við skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins. Tú skalt samskipa, leggja til rættis og fylgja viðlíkahaldi av skipum, skipa fyri umvælingum og seta skip í dokk.

Skipsinspektørurin tekur sær av teknisku ráðgevingini til skipsleiðsluna, og hann skal syrgja fyri, at formligu ásetingarnar, trygdarútgerð og siglingarloyvi eru í lagi.

**Umsøkjarin**
Tú ert útbúgvin markinsverkfrøðingur ella hevur í minsta lagi 3 ára útbúgving sum maskinmeistari, og tú hevur kunnleika til viðlíkahaldsskipanir og royndir við skiparakstri. Vit leggja dent á, at tú hevur fokus á rakstrarútreiðslur, trygd og umhvørvi.

Vit rokna við, at tú dugir at brúka tekstviðgerð, rokniark og dátabasu, og tað er ein fyritreyt, at tú hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum og enskum. Vit vænta, at tú ert lættur at samstarva við, tolir broytingar og ert vanur at hava nógv um oyruni samstundis.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi og ábyrgdarfult starv, har góður møguleiki er fyri menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi við samstarvssinnaðum starvsfelagum, og arbeiðsdagurin er mangan fjølbroyttur. Lønar- og setanarviðurskiftini verða skipað sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Arbeiðsstaður**
Arbeiðstaðurin verður í Tórshavn til uml. ársskifti, har síðan arbeiðsstaðurin veður á Tvøroyri.

**Setan og umsókn**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Tú fært meira at vita við at seta teg í samband við Regin Vágadal, rakstrarleiðara, tel 34 30 00 / 543041 ella t-post rev@ssl.fo

Umsókn við próvskjølum og møguliga viðmælum verður í seinasta lagi 15. mars at senda til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

ella send ein t-post til pah@ssl.fo


Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Strandferðslan umsitur 29 farleiðir (7 Oyggjaleiðir og 22 Bygdaleiðir). Talið á flutningsførum er 8 ferjur og 40 bussar. Samlaða talið av starvsfólkum svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS